# Skilja ikki rættiliga drápið

**Vanlig fólk í Ísrael skilja ikki rættiliga, hví júst Ahmed Yassin varð dripin mánamorgunin. Tey halda ikki avgerðina verða serliga væl umhugsaða, sigur kona fyrrverandi trygdarleiðaran í Ísrael**

YVIRGANGUR
*Edvard Joensen*



*Sari Gillon, sum saman við manni sínum, Carmi Gillon, hevur vitjað í Føroyum, sigur, at fleiri ísraelsfólk halda, at tað var skeivur maður, sum varð dripin mánamorgunin*

Hatta er ørt. Hatta er ikki fyrireikað við høvdinum, men við búkinum, sigur ísrealska Sari Gillon um hendingina, tá Hamas leiðarin, Ahmed Yassin, varð dripin mánamorgunin.

Sari Gillon er gift við Carmi Gillon, sum er fyrrverandi leiðari í trygdartænastuni Shin Bet og eisini hevur verið ísraelskur sendimaður í Danmark. Tey búgva í dag í býnum Mevaseret Zion beint uttan fyri Jerusalem, har Carmi Gillon er borgarstjóri.

Hon sigur, at nógv ísraelsfólk halda, at tað er skeivur maður, sum tikin er. Tað var ikki klókt at drepa hann. Heldur skuldu aðrir, sum standa ovari á listanum, verðið tiknir. Gamaní er talan um ein leiðara í einum yvirgangsfelagsskapi. Men tað eru so nógvir aðrir í hasum bólkinum, sum eru vandamiklari enn hann, sum nú varð dripin, heldur Sari Gillon.

Ariel Sharon og Benjamin Nethanyahu standa aftan fyri avgerðina, sigur hon. Og tað eru eisini fólk í Ísrael, sum taka undir við tí, sum hent er. Men tað eru rættiliga nógv fólk, sum ikki skilja avgerðina og ikki halda hana vera rætta, sigur hon.

– Vit royna at fáa tað besta burtur úr støðuni her niðri, sigur Sari Gillon. Vit eru so von við eit sindur at hvørjum, at tað ávirkar okkum ikki so øgiliga nógv longur. Mánadagurin var nakað løgin, men longu í dag (týsdagin, blðm.) er støðan sum vanlig aftur, sigur hon.

Tað ber ikki til at vera bangin, um ein skal búgva í Ísrael, sigur Sari Gillon. Vit mugu taka tað, sum kemur og fáa tað besta burturúr.

Palestinar hava lovað hevnd og deyða til hvørt hús í landinum, siga altjóða tíðindastovurnar. Men tað taka tey eisini rímiliga róligt í Ísrael, sigur Sari Gillon.

– Tað ljóðar altíð nógv ógvusligari úti í heimi, enn tað, vit uppliva, sigur hon. Fólk, sum bara fáa tíðindi frá CNN og slíkum støðum, fáa ofta eina eitt sindur einstáttaða mynd av støðuni. Veruleikin er ofta eitt sindur øðrvísi, sigur hon.

Men fólk hugsa kortini um støðuna og um, hvat teir kunnu finna upp á, nú páskirnar nærkast og nógv fólk fer at savnast í Ísrael. Tað er helst eingin ivi um, at fleiri fara at vera enn meira á varðhaldi, enn tey vanligt eru, heldur Sari Gillon.

# Gongufaldari við avmarkingum

**Gongufaldarin, sum Ferðaráð Føroya herfyri fekk virðisløn fyri á ferðavinnumessu í Berlin, fæst ikki á flogvøllinum, har eini 150.000 ferðafólk árliga koma og fara**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*



*Á ferðavinnumessu í Berlin fyri stuttum, fekk Ferðaráð Føroya virðisløn fyri gongufaldaran. Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráðnum, tók í móti virðislønini*

**Flogvøllurin:**
Tað bar ikki til at fáa virðislønta gongufaldaran hjá Ferðaráðnum við kunningardiskin á flogvøllinum. Boðini vóru, at Ferðaráðið vildi ikki, at hann skuldi latast út haðani.

Blaðmaðurin stóð sum Kánus. Tað kundi ikki bera til, at ein reklamufaldari fyri gonguferðir í Føroyum skuldi vera loyniligur?

Nei, tað var hann heldur ikki segði fryntliga avgreiðslukvinnan inn fyri diskin. Men boðini vóru, at hann skuldi seljast fyri 10,- krónur, men ikki á flogvøllinum, tí tað gjørdi, at sølan aðrastaðni fór at minka so nógv, at aðrar kunningarstovur fingu ov lítið butur úr søluni, tí so nógv fólk kom um flogvøllin.

– Hetta ljóðar heilt løgið, og er avgjørt eisini ein misskiljing, sigur Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráð Føroya. Hann veit ikki, hvør hevur givið slík boð, men sigur, at tað skal rættast beinanveg. Sjálvandi skal faldarin fáast har, flestu ferðafólkini koma, sigur hann.

Avgjørt varð, tá faldarin kom út, at hann skuldi seljast fyri hesar tíggju krónurnar, sum kunningarstovurnar so sjálvar fingu í sín part. Hetta varð roknað sum eitt slag av stuðuli frá Ferðaráðnum, sigur Heri Niclasen. Vanligt hevur annars ikki verið at tikið pengar fyri reklamu, sigur hann.

– Tað kann sjávandi henda, at kunningardiskurin á flogvøllinum fer at selja fleiri faldarar, enn aðrar kunnignarstovur, men tað eru so treytirnar. Hasa misskiljingina skulu vit beinanveg fáa burturbeinda, sigur Heri Niclasen.

Sostatt skuldu útlit verið fyri at virðislønti gongufaldarin eisini verður at fáa á flogvøllinum í framtíðini.

# Vesturvón góðan túr

*Vesturvón hevur góð 800 tons av flaki inni. Teir komu aftur úr Barentshavinum um vikuskiftið og hava verið burtur í umleið hálvantriðja mánað*
*Mynd: Edvard Joensen*



**Vesturvón kom um vikuskiftið aftur av fyrsta túrinum eystanfyri í ár. Teir høvdu góð 800 tons av flaki inni**

Fiskiskapur
Edvard Joensen
Sørvági:
Vesturvón kom aftur úr Brentshavinum um vikuskiftið. Hann hevur fiskað 810 tons av flaki, sum verða løgd upp hjá Kloosterboer í Kollafirði og verða send til Onglands við farmaskipi.

Ólavur Petersen, reiðari, sigur, at hesin fyrsti túrurin í ár vardi umleið hálvantriðja mánað. Teir royndu fyrst í norskum sjógvi, sigur hann, men fluttu síðan í rusiskan sjógv. Slagið er toskur og hýsa umframt eitt sindur av upsa.

Prísurin er lækkandi í løtuni, sigur reðarin. Men hann metir, at lastin man hava eitt viðri, sum liggur oman fyri 20 milliónir krónur. Manningarparturin plagar at liggja um 10 prosent av samlaða søluvirðinum. Lastin er ikki seld enn, sigur hann. Tað verður hon ikki, fyrr enn hon er komin til Grimsby.

Vanliga plagar Vesturvón at fara til Onglands við lastini, men so verður ikki hesaferð. Vanliga plaga teir at bunkra í Onglandi, har oljan er bíligari enn hjá okkum. Men tað ber ikki til hesaferð, tí skipið skal á beding í Føroyum, og tá skal tað vera tómt og lætt fyri at kunna verða tikið upp. Talan er um vanligt eftirlit og viðlíkahald, sigur Ólavur Petersen.

Farið verður avstað aftur, beinanveg skipið er klárt. Teir eiga ein túr eftir eystanfyri, sigur reiðarin.



# Tørvurin er staðfestur

**Eftir at listaframsýningin Fram í Ljósið hevur hingið upp í knappar tvær vikur, kann út frá undirtøkuni og áhuganum staðfestast, at tørvurin á eini tílíkari framsýning so avgjørt hevur verið og er tilstaðar**

FRAMSÝNING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Undirtøkan og móttøkan av framsýningini Fram í Ljósið, sum Norðoya Sparikassi skipaði fyri, vóru avbera góð, og er tað ein staðfesting av tørvinum, heldur Gunnar Nolsøe, marknaðarleiðari í sparikassanum*

**Klaksvík:**
60 luttakarar, 235 listaverk og 1.500 vitjandi. Harvið er tørvurin á eini listaframsýning fyri ókend og minni kend listafólk staðfestur.

Hetta er niðurstøðan hjá Gunnari Nolsøe, marknaðarleiðara í Norðoya Sparikassa, sum skipaði fyri framsýningini, í sambandi við eftirmeting av framsýningini Fram í Ljósið.

Gunnar sigur, at afturmeldingarnar frá fólki hava verið sera positivar, og leggur hann dent á, at tað er sera hugaligt at skipa fyri slíkum, tá undirtøkan og móttøkan eru so góð.

Sum sagt vórðu 66 listaverk seld á framsýningini. Millum teirra vóru seks landslagsmyndir evnaðar til úr fiskaskræðu, og tær vórðu allar seldar.

Hendan framsýningin var ikki bert lokal. Av teimum 60 luttakarunum vóru 14 uttan fyri norðoyggjar.

Undirtøkan var góð, og øll sum teknaðu seg til innan evsta mark, sluppu við. Nøkur fá vóru ov sein at tekna seg, og tey fingu noktandi svar, tí undirtøkan var so góð.

Gunnar Nolsøe torir ikki at siga, um Norðoya Sparikassi aftur fer at skipa fyri eini tílíkar framsýning, men hann slær bara fast, at tørvurin hervið er staðfestur.

# Kórstevnan 2004

**Árliga kórstevnan verður í Føroya Læraraskúla í døgunum 15. - 18. apríl**

TÍÐINDASKRIV
*post@sosialurin.fo*

Hóast tað eru kórini í Kórsambandi Føroya, sum skipa fyri árligu kórstevnunum, so er hon fyri allar áhugaðar sangarar - eisini teir sokallaðu "kórleysu".

Um hesi hava ætlanir at luttaka eiga tey at boða frá luttøku hjá nevndarlimum kórsambandsins á telefon 311819, 332318 ella 424439 seinasta lagi 29. mars.

Danski kórmaðurin Mogens Dahl verður kórleiðari hesaferð. Luttakaragjaldið 150 kr skal gjaldast á kontu 6460-4656999. Bankakvittanin verður luttøkuprógv.

Markið fyri, at kórstevnan verður av nøkrum, er, at minst 100 sangarar eru skrásettir 29. mars.

Tónleikaliga innihaldið á stevnuni hesaferð verður burtur úr syrpuni Liebeslieder hjá Johannes Brahms fyri kór og klaverfylgispæl. Jóhannes Andreasen og ein av næmingum hansara spæla undir. Og norðurlendskar kórperlur.

## Stevnuskráin

| | | |
|---|---|---|
| Hóskvøldið | 15. apríl: | venjing kl. 19.00 - 22.00 |
| Fríggjakvøldið | 16. apríl: | venjing kl. 18.45 - 21.30 |
| Leygardagin | 17. apríl: | venjing kl. 9.30 - 12.30 og kl. 14.00 - 18.00 |

Aftaná verður hugnaløta í læraraskúla kantinuni

| | | |
|---|---|---|
| Sunnudagin | 18. apríl: | Venjing kl. 14.00 |
| Framførsla í læraraskúlaskálanum | | kl. 17.00 |

# Vilja finna málningarnar aftur

**Í síðstu viku kom fram í Sjónvarpi Føroya, at Listasavn Føroya ikki veit, hvar 80 listaverk hjá savninum eru**

LIST
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Listasavn Føroya hevur arbeitt í eina tíð við at gera eina dataskráseting yvir teirra málningar, og tá arbeiðið var liðugt, var greitt, at áttati málningar eru so at siga horvnir. Tað vil siga, at Listasavnið veit ikki, hvar teir eru, ella hvat er hent við teimum.

Hetta harmast tey nógv um á savninum, og tí koma tey fram við hesum við vón um, at fólk fara at hyggja at málningum, sum tey hava hangandi.

– Skuldi tað so víst seg, at tað stendur Listasavnið á onkrum av teimum, so vil eg so staðiliga heita á fólk um at siga okkum frá. Ella um onkur er, sum møguliga veit, hvat kann verða hent við onkrum av málningunum, sigur Helgi Fossádal, stjóri á Listasavni Føroya.

Hann sigur, at síðani tíðindini bórust um, at málningar manglaðu, hevur Listasavnið fingið onkra fráboðan, men tað eru ikki nógvar. Og Helgi vónar tí, at tað fara at koma fleiri.

### Dataskráseting

Horvnu málningarnir hjá Listasavninum eru flest allir gamlir málningar. Tað vil siga, at teir eru frá fyrr enn 1970, tá savnið fekk egin høli. Men onkur er kortini nýggjari.

Áðrenn tað hevði savnið onki fast høli, og tí vórðu málningarnir spjaddir runt um, har teir kundu hanga.
Listasavnið hevði eina pappírsskráseting, sum tey nú hava gjørt til eina dataskráseting, og tað er sum sagt í hesum sambandinum, at tey eru varðug við horvnu málningarnar.

Listasavnið veit sostatt av hesum málningum, men veit bara ikki, hvat er vorðið av teimum gjøgnum árini. Og tað vilja tey fegin fáa staðfest.

– Vit mugu sum stovnur gera alt tað, vit kunnu fyri at fáa málningarnar aftur ella staðfest, hvat er vorðið av teimum, sigur Helgi Fossádal.

# Vágaskot kostaði drongi lívið

**Mánadagin seinnapartin fekk løgreglan á Tvøroyri fráboðan um, at ein drongur av ósketni hevði skotið seg sjálvan í einum húsum á Sevmýri**

VANLUKKA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Ein skotvanlukka mánadagin kostaði einum 15 ára gomlum drongi á Tvøroyri lívið. Drongurin var staddur í kjallaranum, tá vanlukkan hendi. Løgreglan kom á staðið og staðfesti, at skotið hevði rakt hann í høvdið, og hann var deyður á staðnum.

Trý ungfólk vóru hjástødd og sóu vanlukkuna. Hesi trý stóðu uttanfyri, tá løgreglan kom á staðið, og fingu tey bráðfeingishjálp beinanvegin.

Hvussu vanlukkan hendi er kortini ógreitt, tí ongin teirra sá júst, hvussu skotið gekk av. Drongurin helt byrsuna framman fyri sær og skuldi helst seta hana frá sær, men so er skotið gingið av á ein ella annan hátt.

– Um hann kom til at slíta ketuna á boylanum ella hann hevur sett hana ov harðliga niður í gólvið, ber ikki til at staðfesta. Men talan er um eitt vágaskot, greiðir sýslumaðurin frá.

### Tilbúgving

Beinanvegin eftir, at vanlukkan var hend, fingu avvarðandi hjálp. Foreldur at floksfeløgum, floksfelagar, prestur og løgreglan savnaðust til eina løtu, har tey tosaðu um vanlukkuna og høvdu eina andakt. Men hjálpin til familjuna og tey nærmastu hjá dreinginum verður fyri seg sjálva.

– Tey hava fingið ein ógvusligan skelk, so tey koma inn í hesa tilbúgvingina nakað seinni. Men tey verða so als ikki slept hesum viðvíkjandi, sigur sýslumaðurin.

Avrátt var so eisini, at haldast skuldi fram við hesum í skúlanum dagin eftir. Og týsdagin kom eisini sálarfrøðingur úr Havnini suður til Tvøroyrar at hjálpa.

Tvøroyar skúli hevur eina tilbúgvingarætlan, sum skúlin fylgir í hesum sambandi – umframt at tilbúgvingin á Landssjúkrahúsinum beinanvegin varð sett í verk eftir vanlukkuna.

– Vit hava so roynt alt, tað vit kunnu, men hetta er ein skelkur fyri alla oynna, sum fer at taka tíð at koma yvir, sigur sýslumaðurin á Tvøroyri.